SOSIALURIN

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 11820
Tórshavn

Blaðstjórn:
Torfinn Smith (ábyrgd)
Hanna Lisberg

Tað er ikki loyvt at avfotografera lýsingar og myndir úr SOSIALINUM til nýtslu í øðrum bløðum uttan loyvi frá ábyrgdarblaðstj.

Umboðan

JAVNAÐARFLOKKURIN hevur, sum til øll undanfarin val, eisini hesaferð stillað lista til fólkatingsvalið. Umframt Johan Nielsen, fólkatingsmann, hevur flokkurin sett fram sum valevni: Hilmar Bech, Haldor Hansen, Jonu Henriksen, Martin Joensen, Petur Eli Mikkelsen Mannbjørn Mortensen og Axel Skoubo. Valevni floksins fara útfrá sjónarmiðum javnaðarmanna at virka fyri, at tey mál og mið, sum flokkurin stremb ar framímóti, verða framd.

JAVNAÐARFLOKKURIN hevur tað aðalsjónarmið, at tað kann ikki verða annað enn beint, at flokkurin er við í teimum valum og í teimum umboðum, sum politiska virksemi gevur flokkinum. Tað hevur týðuliga víst seg, at henda støða er hin einasta beina.

UPPUNDIR hetta valið upplíva vit, at eisini flokkar sum í mong ár hava tvíhildið um ta støðu, at vit ikki skulu vera við, har avgerðir um okkara lands viðurskifti falla, nú knappliga hava broytt støðu, og taka undir í teirri sjálvsøgdu støðu, ið javnaðarflokkurin ferð eftir ferð hevur hildið fram.

TEY árini javnaðarflokkurin hevur verið umboðaður á Fólka tingi hava sýnt, at flokkurin við síni umboðan hevur havt góða ávirkan á, at okkara fólks støða hevur verið fylgd.

VIÐ at geva atkvøðu fyri javnaðarflokkinum til fólkatingsvalið 5. oktober ella til ein av valevnum floksins, verður møguleikin at gera umboðan føroyinga á fólkatinginum til tað sterka amboðið, sum hon eigur at vera í einum fólkavaldum tingi.


Kunngerð

Tórshavnar kommuna ætlar hin 1. november 1971 ella so skjótt til ber at seta 1 ella 2 heilsusystrar í Tórshavn.

Viðvíkjandi arbeiði, løn og treytum fyri setan verður víst til lýsing í Tidsskrift for Sygeplejersker nr. 17 A/1971.

Umsóknir skulu innan 18. oktober sendast til

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ,
3800 Tórshavn



Bladstjóri!

Tað gleðir meg at siggja, at nú er áhugin fyri spursmálinum um viðurskifti okkara í samband við EEC blivin so støtur, at lesarir eru farnir at skriva um sína áskoðan til hetta málið.

Higartil hevur bara ein franksjón, sum nevnir seg Felagsskapurin móti EEC, sligið tónan ann, og tað liggur í luftini, at hesin felagsskapur er domineraður av tjóðveldismonnum, sum her hava sæð sær ein tjans til at »skúma flotan«.

Hetta er stórt spell, tí hetta mál hevur uppiborið størri álvarsemi enn so, at tað skal vera brúkt sum vanligt tjóðveldisblak. Um tað hendir, kunnu vit rokna við, at einki høpi verður í, tí tað sum man frá tí síðuni hevur sæð higartil í hesum máli er hvørki ella ungi, bert oppertunisma í hægsta potensi, uttan fyrilit fyri hvørja ávirkan ein tílík handfaring av hesum máli kann fáa.

Nú er líkt til, at bæði kvinnur og menn í Javnaðarflokkinum vilja taka til pennin og siga sína hugsan um henda stóra spurning.

Vit munnu nokk vera ikki so fá, sum ynskja ein sovorðnan debatt, heldur enn henda meiri agitatoriska fyri/ímóti formin, sum er so fjúrtandakendar, at man sigur sum so, ná soleiðis, har er einki álvara aftanfyri, og eingin vilji til at koma við sakligum motivum fyri ella ímóti.

Og er tað nakað vit sakna í hesum orðaskifti, so eru tað saklig innlegg, nakað sum man kann fáa at hugsa um.

Eitt av tí mest positiva í hesum tjaki eru greinirnar, sum Vilhelm Johannesen og Aksel Skoubo hava skrivað um EEC, tað verður forvitnisligt [illegible] hesin dialogurin kann taka seg upp; vónandi fara teir at leggja sær við at koma við skilagóðum og upplýsandi innleggum, tað at teir eru ósamdir, tað ger tað ikki keðiligari.

Lesari.

* * *

Villeiðandi skriving í 14. sept.

Tá tað ikki eydnaðist borgarstjóranum í Havn — Kjartan Mohr — at hitta landsstýrið í fyrstu atløgu, legði hesin við óhóviskum briksli og útspilling eftir landsstýrinum í almennum blað.

Hetta fekk Atla Dam, løgmann — her í blaðnum — at greiða borgarstjóranum og lesarum frá, at borgarstjórin hevði fingið eina skeiva uppfatan, tá hann helt seg kunna sleppa framat í Tinganesi framum øll onnur og skrivar løgmaður soleiðis: »skal Kjartan Mohr sleppa framat framum mannin í Fuglafirði, sum ætlaði at byggja sær eitt skip, konuna í Klaksvík sum hevði trupulleikar við skatti sínum, ella mannin á Tvøroyri, sum hugsar um at gera sær eitt virki...«

Undir yvirskriftini: »Atli vil ikki víðka havnina«, fær »14. sept.« vent orðum løgmans til hetta: »Atli Dam sigur, at tað er av størri týdningi, at hann skal hjálpa eini konu í Klaksvík við skattinum, enn at hann fæst við hetta mál, og tað vil siga so mikið sum, at hann gongur ímóti at víðka havnina«.

Slík ósonn og villeiðandi skriving, bygd á illgitingar, fær okkum lesarar at spyrja: er Gøbbels — tiltikni demagogurin og propagangamálaráðharri Hitlers — verunliga deyður?

Slík skriving er fyrst og fremst ein undirmeting av føroyingum. Tí skriving av hesum slagi er treytað av, at tann sum skrivar, metir lesarar sínar at vera býttar og tí sera bíliga og lætt lata seg villeiða.

Men eitt skal blaðstjórin á 14. september tó vita og tað er tað, at vit duga at lesa, vit duga at bera saman og vit duga at skyna og solda hansara villeiðandi skriving burtur úr.

Løgmaður hevur ikki við ein um orði nevnt, at skattaspurningurin hjá eini konu í Klaksvík hevði størri týdning enn víðkan av havnini í Havn. Løgmaður hevur heldur ikki í grein síni tikið støðu fyri ella ímóti víðari havnabygging í Havn, men vísti aftur óhóviska og útspillandi álopinum frá borgarstjóranum í eitursprænu tjóðveldismanna.

Tað man harma mangan skattgjaldara, at hansara peningur — undir heitinum almennur stuðul til politiska upplýsing — skal verða nýttur til persónjagstran, persónliga útspilling og villeiðing alt samalt bygt á slatur, sleyg og illgitingar.

Slík ósømilig skriving rímar illa saman við føroysku fólkahugsanini og munnu tey flestu eisini skyggja slíka skriving.

Kona í Klaksvík.

FØROYA
BANKI
banki FØROYA

„Heldur fólkaræði uttan sosialismu - enn sosialismu uttan fólkaræði"

Danski Javnaðarflokkurin hevur 100 ár á baki. 100 ár við sigrum og tapum. 100 stravin ár fyri teir leiðandi, sum mangan hava verið eltir av yvirvaldi og øðrum

Nógv er nátt, men nógv er eftir

21. juli er føðingardagurin hjá danska javnaðarflokkinum, og í ár vóru liðin 100 ár síðani flokkurin var settur á stovn.

Um tað mundi tá franska kollveltingin fór fram, gjørdust donsku arbeiðararnir sannførd ir um politisku støðuna. Men javnaðarflokkur var tó ikki stovnaður fyrr enn 21. juli í 1871. Henda sama dagin kom eisini blað teirra út á fyrsta sinni sum kallaðist SOCIALISTEN. Tað vóru Harald Brix og systkinnabarn hansara Louis Pio sum settu seg á odda fyri hesum við seinast nevnda sum blaðstjóra.

Tað var tað sosiala órættvísið, sum javnaðarmenn fremst av øllum settu sær fyri at berjast ímóti, men eisini sóu teir skjótt týdningin av at skapa organisatión, sum gjøgn um alla søgu javnaðarflokksins hevur givið flokkinum styrki.

Júst í hesum var sum sagt styrkin. Fólkið fekst við á henda hátt í teim ymsu deildunum sum flokkurin hevði og har fór fram tjakið um teir aktuellu spurningarnar.


№ 1. „Ingen Retfærdighed uden Pligter, ingen Pligter uden Retfærdighed". № 1.

Socialisten.

Et Ugeblad for Arbejdernes berettigede Fordringer.

Juli 1871: [illegible] Udgaar hver Lørdag. [illegible] Kjøbenhavn.

Socialisten kom út á fyrsta sinni 21. juli 1871. Hann kom út eina ferð um vikuna.

Prinsipporðaskiftið hevur altíð verið aktivt í danska javnaðarflokkinum, nú sum fyrr. Stauning segði einaferð í fýratiárunum: »Heldur fólkaræði uttan sosialismu — enn sosialismu uttan fólkaræði«. Hetta hevur altíð verið stevna javnaðarmanna.



Louis Pio

Tað vóru løgnar umstøður, dramatikkur, ævintýr og seinast tragedia, sum var honum fyri, ið stovnaði Javnaðarflokkin í Danmark, Louis Pio.

Hann var sonur ein heryvirmann, og var sjálvur, eftir at hann sjálvboðin hevði luttikið í stríði loytnantur. Seinri var hann í poststarvi, men máttti fara úr hesum starvi, eftir at hava givið út »Socialisten« 21. juli 1871. Hann byrjaði sítt stríð fyri sosialismuni ávirkaður av »Parisarakommununi« og bretsku fakfelagsrørsluni, og organisatiónin varð stovnað í Danmark sum ein partur av sosialistisku internationalu hjá Karl Marx. Felagið var býtt upp í partar, eftir teim ymsu støruvunum og ein partur var hin ikki-fakligi.

Fyrst í 1872 var danski internationali stovnaður, og Pio, Geleff og Brix vóru valdir í stjórnina.

Tá fundur 1. mei 1872 var fyrireikaður í Keypmannahavn fyri at stýðja múrarar, sum vóru í verkfalli, vóru teir triggir áðurnevndu handtiknir. Eftir at teir vóru hildnir aftanfyri tremmurnar í eitt ár, vóru teir dømdir til fongsulsevsing.

Í 1873 bannlýsti hægstirættur »Internationala«. Í staðin vóru fakfeløg sett á stovn, og var frøi á monnum tá teir triggir innlæstu í 1875 vóru latnir leysir aftur.

Fylgjandi árini vóru syrgilig. Pengar vóru ongir, og hetta nívdi fakfelógini, og Pio misti sambandi við limirnar. Ávirkaður av hesum tók Pio ímóti tilboði frá politinum, sum var, at hann skuldi fáa ávisa nøgd av peningi, so at hann og Geleff kundu fara til Ameriku. Hin 23. mars í 1877 fóru hesir báðir menninir úr Keypmannahavn, uttan at nakar visti av. Sambandið sum Pio hevði við danska fakfelagsrørsluna var av, og eftir at hann hevði gingið fyri vág og vindi í Amerika í nokur ár doyði hann í Chicago í 1894, bert 53 ára gamal.